Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogar til Rúnarveg

Søkt verður eftir pedagogum til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík.

Talan er um 2 pedagogstørv á 40 tímar um vikuna, frá skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu. Og 1 pedagogstarv á 40 tímar um vikuna frá 1. juli 2010

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Setanar-økið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Sambýlið og Bústovnurin á Rúnarvegi í Runavík.

Um ongin pedagogur søkir starvið, verða onnur sett í staðin, og verða tey lønt eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði. Vikuskiftisarbeiði er 3. hvørt vikuskifti.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 763130

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum prógvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Rúnarvegi 6
620 Runavík
Stílað: Oddfríða Højgaard, leiðari

**Umsóknarfreist: 8. mai 2010 kl. 12.00**

---

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

zarepta



## Lega fyri støk á Zarepta

Legan er fyri øll støk, 30 ár og eldri.

Legan byrjar fríggjakvøldið 14. mai kl. 19. og

heldur fram til eftir døgurða sunnudagin 16. mai.

Evnið verður »*Søgur, ið mynda okkum*«

Tilmelding fer fram við at ringja til

Eydnu Berg, tlf. 219651 ella 319651

Sí www.zarepta.fo

---

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# L E I Ð A R I

## TIL DAGSTOVNIN Í FUGLAFIRÐI

Fuglafjarðar kommuna søkir eftir leiðara til dagstovnaskipanina hjá kommununi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja tann 01. juli 2010. Viðkomandi persónur, ið settur verður, verður starvsettur hjá Fuglafjarðar kommunu við fyribils arbeiðsstaði á dagstovninum á Mirmansvegi 2 í Fuglafirði. Roknast kann við bygnaðarbroytingum innan dagstovnaøkið, tá ið nýggi dagstovnurin verður tikin í nýtslu á Kambsdali.

Stovnurin er skipaður við 2 vøggustovum við 24 børnum og trimum barnagarðsstovum við 52 børnum. Stovnurin, sum er rúmsáttur, er bygdur í 1990 og útbygdur í 2006.

**Vit bjóða**
- Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv.
- Møguleika at seta dám á stovnin.
- Møguleika fyri ráðgeving.
- Møguleika fyri eftirútbúgving.
- Tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan kemur at skipa fyri millum leiðarar innan ansingarøkið.

**Vit vænta at tú**
- Ert útbúgvin pedagogur við møguligum leiðsluroyndum.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt, taka avgerðir og hevur ábyrgd sambært dagstovnalógini.
- Hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu- og barnagarðsbørnum.
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan arbeiðsdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.
- Hevur góð evni at umstilla teg í einum broyttum umhvørvi.
- Sær møguleikar fram um vansar.
- Hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.
- Kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og kommunu.
- Dugur væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis.
- Hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum.
- Hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn saman við møguligum viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndum skal verða Fuglafjarðar býráð, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. mai 2010 kl. 16.00.

**Nærri kunning**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Irenu Olsen, sosialdeildarleiðara á telefon 737756 ella Julionnu Næs, dagstovnaleiðara á telefon 737780.

*Fuglafjørður, tann 21. apríl 2010*

**Fuglafjarðar býráð**

---

MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Ráðstevna um skúlabyrjan

## – at byggja brýr millum barnagarð og skúla

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, skipar fyri ráðstevnu um, hvønn týdning, ein vælskipað skúlabyrjan hevur fyri læring, menning og trivnað hjá børnum.

Ráðstevnan verður í høllini í Norðurlandahúsinum mánadagin tann 10. mai 2010 og byrjar kl. 08.30.

Ráðstevnan er ætlað lands- og kommunalpolitikarum, umboðum fyri skúlastýri, leiðarum í barnagørðum, skúlaleiðarum, lærarum, sum arbeiða í byrjanarundirvísingini, pedagogum, ið arbeiða í barnagørðum, forskúla og frítíðarskúlum, kommunufeløgum, umboðum fyri Føroya Pedagogfelag og Føroya Lærarafelag og annars øllum áhugaðum. Ráðstevnan er ókeypis, men neyðugt er at boða frá luttøku í telduposti til tove@mmr.fo í seinasta lagi 6. mai 2010 kl. 13.00.

**Á ráðstevnuni verður ljós varpað á:**
- Hvussu vit sum samfelag skipa bestu menningarumstøður námsfrøðiliga, fakliga, sosialt og mentanarliga hjá børnum í skúlabyrjanini, so at skiftið frá barnagarði til ávikavist skúla og frítíðarskúla verður so lagaligt sum til ber og lagað til tørv og fortreytir hjá einstaka barninum.
- Nær børn eiga at byrja í skúla, hvussu skúlabyrjanin verður skipað, og hvussu vit tryggja samanhang í skipanini við námsfrøðiligum stevnumiðum, lesiætlanum og góðum samstarvi millum starvsfólk í barnagarði, skúla og frítíðarskúla.
- Hvørji tilboð, vit hava at bjóða teimum seks ára gomlu og ymisk sjónarmið um, hvussu hesi tilboð kunnu verða sett í verk.
- Vitan frá granskingarverkætlanum, sum verd er at hava í huga, tá ið menningar¬átøk verða skipað fyri næmingar í byrjanarundirvísingini.

**Á ráðstevnuni vera m.a. hesir fyrilestrar:**

**Peder Haug, Noregi: Um skúlabyrjan hjá 6 ára gomlum í Noregi**
Peder Haug er professari í námsfrøði við Høgskolen í Volda í Noregi. Hann hevur m.a. skrivað doktararitgerð um skúlabyrjan hjá seks ára gomlum børnum, og hvørjar fyritreytir eiga at vera. Hann hevur eisini verið leiðari av fleiri granskingarverkætlanum um barnagarðar og skúlar, umframt gransking innan pedagog- og læraraútbúgvingar.

**Karolina Matras, Føroyar: Mál sum menningar- og samskiftismiðil**
Karolina Matras er leiðari av slóðbrótandi granskingarverkætlan í Føroyum um málsliga menning og lesimenning hjá børnum. Karolina Matras er cand. pæd. psyk. og tekur PhD á Fróðskaparsetri Føroya í samstarvi við Danmarkar Pædagogiska Universitet.

**Niels Egelund, Danmark: Skúlabyrjan og samstarv millum barnagarð, skúla og frítíðarskúla**
Niels Egelund er professari og leiðari á deildini fyri Grundskúlagransking á Danmarkar Pedagogiska Universiteti. Niels Egelund var okkum hollur í ráðum, tá ið Føroyar fóru undir PISA-undankanningina, sum m.a. vísti á, at tørvur var á at bøta um byrjanarfrálæruna, og Niels Egelund var við til at skriva tær fyrstu niðurstøðurnar um PISA-kanningarnar í Føroyum. Niels Egelund hevur millum annað verið leiðari av tí danska partinum av altjóða PISA-kanningunum.

**Ingmarie Munkhammar, Svøríki: Samstarv millum barnagarð, skúla og frítíðarskúla**
Ingmarie Munkhammar undirvísir á Lærda Háskúlanum í Luleå í Svøríki. Ingmarie Munkhamar hevur granskað, hvussu barnagarðspedagogar, frítíðarpedagogar og fólkaskúlalærarar skipa teirra samstarv, og við støði í hesum kanningum hevur hon skrivað doktararitgerð við heitinum »Frá samstarvi til samskipan«.

**Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · FO-110 Tórshavn**
**Tel. 30 65 00 · Faks 30 65 55 · mmr@mmr.fo**